# Lívstrygging

Við lívstrygging frá LÍV hevur tú møguleika at tryggja tíni avvarðandi fíggjarliga, um tú skuldi follið frá. Við lívstrygging verður ein upphædd útgoldin til tey, ið sita eftir, um tú doyrt, áðrenn tú nært fólkapensjónsaldri.

## Hvør kann tekna eina lívstrygging?

Allir kundar í Føroya Banka, ið eru millum 18 til og við 50 ár, kunnu tekna eina lívstrygging. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert arbeiðsfør/ur, frísk/ur og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Av tí at lívstrygging frá LÍV ikki ávirkar aðrar lívstryggingar, ber til at tekna hana, sjálvt um tú eisini hevur trygging aðrastaðni.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Tú kanst velja millum ymiskar tryggingarupphæddir. Upphæddin sum fellur til útgjaldingar við deyða, kann verða upp til kr. 1.700.000. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri lívstryggingina og restskuldartrygging ongantíð fara upp um kr. 3.000.000.

Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Tryggingarupphædd** | 575.000 Kr. | 800.000 Kr. | 1.150.000 kr. | 1.700.000 kr. |
| **Gjald um mánaðin** | 143,75 kr. | 197,71 kr. | 281,75 kr. | 413,67 kr. |

## Útgjald

Lívstryggingin verður útgoldin til tín næsta avvarðandi, um tú doyrt í tryggingartíðarskeiðinum.
Um tú ynskir, at upphæddin við deyða skal ognast øðrum enn næsta avvarðandi, er møguligt at útfylla eitt oyðublað um broyting av tilskilan.

## Skattur

Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt, tó skal arvagjaldið rindast.

Neyvari treytir fyri útgjaldi eru at finna í tryggingartreytunum fyri Samlagstrygging.